LES MEIRA UM SUMMARFESTIVALIN Í TÝSDAGSSOSIALINUM

# Búnaðir Páll Finnur Páll

**Páll Finnur Páll spældu fyrstu konsertina í Flags-teltinum fríggjakvøldið. Teir góvu áhoyrarunum eina góða konsert við kendum løgum og onkrum nýggjum løgum. Teir vóru skerdir av, at teir manglaðu ein lim í bólkinum, og tað hoyrdist aftur í summum løgum. Sum heild var tað ein hampiliga góð framførsla frá Páll Finni Páll**



*Páll Finnur Páll sveima ímillum tað fúla og tað fitta Mynd: Álvur Haraldsen*

SUMMAR FESTIVALUR

Heini S. Kristiansen
heinik@sosialurin.fo

Óvanliga fúlu Páll Finnur Páll hava evnir fyri tí ironiska. Tað kemst ikki uttanum, at summir tekstir hjá teimum eru langt úti, men spurningurin er, hvussu álvarsliga teir skulu takast. Páll Finnur Páll vístu eisini eina meira búna síðu hetta kvøldið við nøkrum tekstum, sum vóru beinleiðis samfelags-viðgerandi og kritiserandi.

Framførslan byrjaði væl við einum sera væl svingandi lagið. Sum framførslan leið, viknaði hon eitt sindur, og áhoyrarnir komu ongantíð veruliga á gos.

Teir sungu teir kendastu sangirnar hjá teimum, "Herbergið" og "Forelskaður Sjónleikari", til seinast, og ikki fyrr enn tá fóru fólk at syngja við. Framførslan náddi sítt hæddarpunkt í byrjanini og móti endanum. Restina av tíðini var einans talan um eina miðalgóða konsert.

Rós skal tó gevast til Finn Jensen fyri hansara framúr vøkru rødd. Hann prógvaði, at hann ikki einans hevur sans fyri tí skemtiliga og sjónleiki. Maðurin dugir eisini sera væl at syngja!

Páll Rubeksen er hin forsangarin hjá Páll Finni Páll, og hann koyrir meira uppá tann ironiska tónan í røddini. Hann fall tó onkuntíð eitt sindur burtur, tá ið hann skuldi syngja stuðulsrødd til Finn Jensen, tí at mikrofonin hjá honum var ikki nóg hart frá. Aðrir smávegis trupulleikar við ljóðinum vóru eisini, men sum heild var konsertin góð.

# Kim spældi alt

**Kim og bólkurin, ið var mannaður av júst teimum, sum Kim vanliga hevur spælt við, spældu løg av fløguni Alt og okkurt nýtt.**



*Tað var hugaligt at síggja Kim spæla annað enn dansitónleik Mynd: Niels Uni Dam*

SUMMAR FESTIVALUR

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Kim Hansen og ein útbygd útgáva av Showmonnum, sum kallaði seg Kim Hansen, spældi eina fitta, pena og góða konsert á Vágsbøi, og á fyrsta sinni ljóðaði risa annleggið sum ein millión.

Nógv hevur verið tosað um hetta størsta annleggið, sum nakrantíð hevur verið í Føroyum, men fríggjadagin ljóðaði tað ongantíð veruliga so væl, sum eitt tílíkt átti. The Rasmus ljóðaði væl, men dekan ov spakuligt var frá. Men tá Alexandur Gaard Joensen stillaði seg aftan fyri knøttarnar og ljóðblandaði Kim Hansen, ljóðaði tað fantastiska væl.

Kim spældi løg av Alt fløguni, og løtan gjørdist sera hugnalig, fólk vaggaðu við og sungu við, tá løg sum Maria, Fagri flokkur, Meistarin, Løtan og Góða rungaðu um Vágsbø. Bólkurin spældi sera væl. Umframt Showmenn, var gamli Taxi keyboardleikarin Magnus Johannesen við, umframt blásararnir Hans Petur í Brekkunum og Ólavur Olsen. Tað klæddi væl sukursøtu balladunum og rock'n'roll løgunum við blásarum. Samanumtikið var konsertin ordiliga góð, og gjørdist ikki verri, tá tað slitnaði í eina løtu. Kim hevur onkursvegna havt hug til at hvørva burtur í leiklutinum, sum sangari í dansiorkestrum, og tí er tað sera hugaligt, at síggja henda frálíka sangara við Kim sangum. Eisini var serliga hugaligt, at okkurt nýtt lag hevði sníkt seg inn í skránna.

# Sámal & Joan Jakku høvdu trupulleikar við tøknini

**Trupulleikar við ljóðinum merktu konsertina hjá Sámali & Joan Jakku fríggjanáttina. Eftir eina seinking byrjaði konsertin, men ljóðið var sera vánaligt, og tað merkti teir á pallinum meira enn áskoðararnar. Hóast hesar trupulleikar, megnaðu teir at spæla seg hampiliga væl upp**

SUMMARFESTIVALURIN
Heini S. Kristiansen
heinik@sosialurin.fo

Sámal Ravnsfjall og Joan Jakku Joensen skuldu saman við Suna Olsen framføra klokkan 23.30, men konsertin var 45 minuttir seinkað. Sámal og Joan Jakku vóru heilt eyðsýnt sera firtnir inn á ljóðmennirnar.

– Hesir klaksvíks-teknikkararnir duga ikki til nakað sum helst, segði Joan Jakku, og tað gav ikki betri huglag til eina konsert, sum frammanundan hevði fingið eina eitt sindur óhepna byrjan.

Tó skal sigast, at Sámal & Joan Jakku mugu taka ein part av skyldini fyri tí miseydnaðu konsetertina uppá sínar herðar, tí at teir vóru heilt eyðsýnt ikki í besta standi til at spæla konsert.

Teir byrjaðu at spæla, men røddirnar hoyrdust illa, og monitorarnir vóru ikki frá. Sum konsertin leið kom tó betri skil á ljóðið, og Sámal & Joan Jakku megnaðu at spæla seg upp aftur við nøkrum gomlum vælkendum løgum.

Teir meira tilkomnu áhoyrarnir kendust væl við løgini, og summi sungu við, meðan summi dansaðu til løgini. Sum heild var tað ein heldur miseydnað konsert, sum var merkt av tekniskum trupulleikum, men har vóru tó einstakir glottar.